# Endaumfarð í Grand-Prix kappingini í borðtennis 2004

**Seinasta vikuskiftið var endaumfarið í Grand-Prix kappingini í borðtennis leikt ítróttarhøllini í Trongisvági**


Mansunglingar


Gentur


Smápinkur


Dreingir


Kvinnuunglingar


Piltar


Pinkur


Smádreingir


Smágentur


Smápiltar


Meistaradeildin

| | | | |
|---|---|---|---|
| Smápinkur | Nr 1 | Rannvá Jacobsen | TBF |
| Smápiltar: | Nr 1 | Rasmus Potts | TBF |
| | Nr 2 | Magnus Egilsson | TOR |
| | Nr 3 | Heini M Mortensen | TBF |
| Pinkur: | Nr 1 | Rakul Mikkjalsdóttir | TBF |
| | Nr 2 | Sheila Strøm | TBF |
| | Nr 3 | Sára Joensen | TBF |
| Piltar: | Nr 1 | Froði Jensen | TBF |
| | Nr 2 | Gilli Sorensen | TBF |
| | Nr 3 | Teitur Justinussen | TBF |
| Smágentur: | Nr 1 | Susie Midjord | TBF |
| | Nr 2 | Joan Thomassen | TBF |
| | Nr 3 | Vivi Jespersen | TBF |
| Smádreingir: | Nr 1 | Reidar Luid | TOR |
| | Nr 2 | Gunnar í Dali | TBF |
| | Nr 3 | Sjúrður Ferjá | TBF |
| Gentur: | Nr 1 | Marin í Dali | TBF |
| | Nr 2 | Rakul Magnussen | Streymur |
| | Nr 3 | Anntóra Láadal | Streymur |
| Dreingir: | Nr 1 | Ragnar Egilsson | TOR |
| | Nr 2 | Sigurð Carlsson | TOR |
| | Nr 3 | Brian Hansen | Streymur |
| Kvinnuunglingar: | Nr 1 | Anna Thomassen | TBF |
| | Nr 2 | Mildrið Djurhuus | Streymur |
| | Nr 3 | Vár Hansen | TBF |
| Mannsunglingar: | Nr 1 | Rógvi Hansen | TOR |
| | Nr 2 | Hanus Stórhamar | TBF |
| | Nr 3 | Sjúrður Thorsteinsson | TBF |
| Meistaradeildin: | Nr 1 | Peter Niclasen | TOR |
| | Nr 2 | Fríði Jensen | TBF |
| | Nr 3 | Eyðun Luid | TOR |



# Matinè í Christianskirkjuni

**Leygardagin fara 4 ungar gentur úr Runavík og Saltangará framføra tónleik á tvørfloytu í Christianskirkjuni. Saman við teimum spælir russiska, Katja Volovelskaja**

MATINÈ
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin verður matinè í Christianskirkjuni í Klaksvík. Tær fimm, Fríðhild, Maria, Morid, Bodil og Katja, fara á tvørfloytu at framføra tónleik úr kenda tónleikaverkinum, Carmen hjá Georges Bizet.

Tær fýra eru vanar at spæla saman og hava verið við til fleiri framførslur her heima. Eisini hava tær verið við í tónleikakappingum hjá Berlingske Tidende, og hava har megnað at vunnið sær heiðurspláss fleiri ár á rað.

Saman við teimum 4, fara vit eisini at hoyra russisku tónleikalærarinnu teirra, Katju Volevelskja.


*Leygarmorgunin fara (f.v.) Fríðhild, Maria, Morid og Bodil at framføra tvørfloytutónleik í Christianskirkjuni í Klaksvík. Saman við teimum spælir Katja Volevelskaja, sum tíverri vantar á myndini*

*Mynd: Maria Olsen*

# Vælumtókt spælipláss

**Børn og starvsfólk í Dr. Margrethubarnagarðinum í Klaksvík hava gjørt eina borg úr mjólkapakkum, har børnunum dámar avbera væl at spæla**

SPÆL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Inni í gongini í dr. Margrethubarnagarðinum stendur ein stór borg. Hetta er ikki nøkur púra vanlig borg. Hon er gjørd úr mjólkapakkum.

Einir 500 mjólkapakkar vórðu nýttir til endamálið og nakrar pappeskjur til hornini.

Súsanna Ziska, sum er ein av námsfrøðingunum í barnagarðinum, hevur lagt lag á, meðan tey hava bygt borgina.

Hon sigur, at hugskotið fingu tey, tí tey nýta so nógva pakkar av mjólk um dagin, at tað kundi verðið stuttligt at nýtt teir til okkurt annað heldur enn bara at tveita teir burtur.

So kom hugskotið við at gera eina borg. Og hendan bleiv so mikið stór,at børnini spæla inni í henni. Tað er nakað, sum er til miklan stuttleika fyri tey.

– Tey hava verið spent uppá hetta, so tað hevur verið sera stuttligt, sigur Súsanna.

Borgin hevur ikki verið nøkur ávís felagsverkætlan hjá børnunum. Hon hevur meira verið nakað, sum tey hava fingist við so við og við í eina tíð.

Tá Sosialurin var á gátt, runnu børnini út og inn í hana. Tey spældu, at hon var eitt fongsil, har fangar sótu fastir.

Børnini halda borgina vera sera stuttliga at spæla í, og hava tey fingið okkurt øðrvísi inn í teirra gerandisdag.


*Mjólkapakkaborgin hjá børnunum í dr. Margrethubarnagarði í Klaksvík er eitt vælumtókt spælipláss*

*Mynd: Bárður Lydersen*

HOTEL VÁGAR ★★★ THE AIRPORT HOTEL

Hugnakvøld
28. februar 2004

Vit stíla fyri
Søluframsýning
Mótaframsýning
3 rætta menu
Undirhaldi við Twilight
Dansi við Twilight

Hesir handlar luttaka:
Klædnabúðin
John Poulsen
Hjá Jákupi
Hjá Káru
Prýðið

Menu
Blinis við salat og skeljadjóra ragout
Ovnstokt lambsfilt fylt við marineraðum kópakjøti
Ostaterta við ráum fruktkompotti

Dansur 100,-

Hugnakvøldið byrjar kl.19.00
Dansur frá kl.23.00

Eitt ógloymandi kvøld
Fyri 195,- -við dansi

Kømur úr 250,- fyri hvønn

Bíleggið í góðari tíð á tel 332955 - ella hjá einum av luttakandi handli (avm. atgongd)

team 85

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA • Sørvágur • Tel 332955 • Fax 332310 • T-postur: hotel@ff.fo

## Búmerkjakapping

Føroyskir blóðgevar lýsa hervið eftir uppskotum til eyðkennismerki. Tað eru 3 feløg í Føroyum: **Klaksvíkar Blóðdonorlið, Felagið Blóðgevi** (á Landssjúkrahúsinum) og **Blóðgevarar í Suðuroy (BGS)**.

Ætlanin er, at eitt felags búmerki skal prýða brævpappír, útgávur o.a., ið hesi 3 feløgini lata úr hondum. Tað skal um møguligt lýsa blóðgávu, har ein blóðdropi er við í myndini.

Støddin á tekningini skal vera u.l. 29x21cm (A4). Búmerkið skal vera í mesta lagi í 3 litum á hvítari bakgrund og skal vera einfalt í strikuni, so hon kann minkast í støðd til u.l. 1,5x1,5 cm. Harumframt skal búmerkið vera egnað at prenta í svørtum/hvítum.

Tekningarnar skulu ikki vera signeraðar, men eitt eyðmerki verður sett aftanfyri á tekningini. Navn, bústaður og telefonnummar verður lagt hjá í afturlatnum brævbjálva, sum hevur sama eyðmerki sum á tekningini.

Øll kunnu luttaka í kappingini. Uppskotini skulu sendast til:

**Felagið Blóðgevi**
CO/ BLÓÐBANKIN
LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
100 TÓRSHAVN

Tekningarnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2004.

Ein dómsnevnd við 3 persónum velur millum uppskotini. Latnar verða 3 virðislønir:

1. virðisløn kr. 8.000
2. virðisløn kr. 5.000
3. virðisløn kr. 3.000

Um dómsnevndin heldur, at onki av uppskotunum er nýtiligt sum eyðkennismerki, verður ongin virðisløn latin.

Virðislønirnar verða handaðar á aðalfundinum hjá Felagnum Blóðgeva í apríl 04, og tá verða øll uppskotini, sum innkomin eru, sýnd fram.

**Føroyskir blóðgevar**
www.gevidblod.fo

Sosialurin 341800